# Jákup fekk aftur møguleikan

**Molde tapti týsdagin tepurt ímóti svenska Halmstad í La Manga í Spania**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Langa venjingarlegan hjá svensku og norsku fótbóltsfeløgunum í La Manga fer nú at halla. Næstsíðsti dystardagurin var týsdagin. Í morgin verða síðstu dystirnir spældir.

Molde spældi týsdagin ímóti svenska Halmstad. Á báðum liðunum vóru fleiri spælarar, sum frammanundan ikki høvdu spælt so nógv á venjingarleguni. Tá fótbóltsspælarar hava verið á venjingarlegu í tíggju dagar, sigur tað seg sjálvt, at teir eru farnir at troyttast. At venja tvær ferðir um dagin og at spæla fleiri dystir um vikuna hevur við sær, at bæði kroppur og sinni ikki eru heilt í topp at spæla.

Tað sást eisini í spælinum, sum verður sagt ikki at hava verið nakað serligt. Í 1. hálvleiki var Molde omaná. Teir høvdu fleiri upplagdar málmøguleikar, og tvær ferðir bjargaðu teir á svenska liðnum á málstrikuni. Svenska liðið hevði onkran einstakan møguleika, men tað var málleyst, tá spælararnir fóru til kærkomnu hvíldina. Um støðan hevði verið 3–1 til Molde, so hevði tað verið á einari leið, siga teir á heimasíðuni hjá Molde.

Eftir steðgin gekk tað meiri javnt fyri seg. Uppløgdu málmøguleikarnir vóru ikki nógvir, og tað var eftir eina deyðbóltsstøðu, tá umfarið var tjúgu minuttir gamalt, at svenskararnir fingu einasta málið. Jákup Mikkelsen hálvbjargaði frísparksroynd av brotsteigarmarkinum, og ein av svensku álopsmonnunum var fyrstur á returinum.

Stóri spurningurin er so, hvussu tað verður við plássinum millum stólparnar hjá Molde, tá sjøtul aftur verður settur á Tippuliguna, sum norska landskappingin verður nevnd. Á venjingarleguni í La Manga hava svenski Eddie Gustafsson og Jákup Mikkelsen vart málið aðru hvørja ferð. Svenski venjarin hjá Molde, Gunde Bengtsson, fer ivaleyst skjótt at gera upp við seg sjálvan, hvønn av teimum báðum hann vil hava sum fyrsta málverja.

Hóast talan er um tveir eins góðar málverjar, so fer tað neyvan at vera soleiðis, at Jákup Mikkelsen fer at verja málið í øðrum hvørjum landskappingardysti og Eddie Gustafsson í øðrum hvørjum dysti. Vanliga er tað soleiðis, at venjarin tekur avgerð um, hvør skal vera fyrsti málverjin, og so verður tað upp til henda at vísa, at venjarin hevur gjørt rætta valið.

# Óli hevur ongan dyst tapt

**Venjingardystirnir benda á, at tað er møguleiki fyri, at tað fer at roynast betri hjá Hvidovre nú, enn tað gjørdi undan vetrarsteðginum**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað royndist alt annað enn væl hjá Óla Johannesen og Hvidovre, tá teir eftir summarsteðgin í fjør royndu at taka fyrsta stigið fyri at gera dreymin hjá størsta eigaranum av felagnum, Peter Schmeichel, til veruleika. Dreymurin var, at Hvidovre innan alt ov rúma tíð skuldi endurvinna støðuna í toppinum í donskum fótbólti, sum teir vóru við til at mynda frá miðskeiðis í seksti árunum og inntil grannarnir í Brøndby rættuliga fingu høvdið fyri seg.

Men veruleikin hjá Hvidovre hevur myndað seg heilt øðrvísi. Síðsta heyst spældu teir fimtan landskappingardystir. Teir vunnu bara tríggjar ferðir, seks ferðir var javnleikur, og teir taptu seks ferðir. Nú síðstu fyrireikingarnar verða gjørdar til seinnu kappingarhálvu, er Hvidovre á 11. plássinum – trý stig frá niðurflytingarplássinum, sum B93 er á.

## Sær ljósari út

Útgangsstøðan undan seinnu kappingarhálvu er soleiðis, at tað í fyrsta umfari verður hugsað um at sleppa burtur úr niðurflytingarvandanum, áðrenn tað verður hugsað um at vera við í stríðnum um uppflyting til superliguna.

Síðandi árskiftið hevur Hvidovre spælt sjey venjingardystir. Og um úrslitini í teimum skulu takast sum ábending um, hvussu tað fer at roynast í landskappingini, so sær ikki so galið út. Hvidovre hevur bara tapt eina ferð. Tað var ímóti superliguliðnum AB, sum vann 5–3. Annars hevur Hvidovre vunnið 5–1 ímóti Birkerød, 1–0 ímóti Brønshøj og 2–1 ímóti HIK. Ímóti Fremad Amager, Farum og Lyngby hevur verið javnt.

Tá Hvidovre spældi 1–1 ímóti Farum vóru teir sera væl nøgdir. Farum liðið var júst komið aftur av venjingarlegu í Spania, har teir hvønn dag høvdu vant á grasi, meðan talan var um fyrsta dystin í hesum árinum á grasi hjá Hvidovre. Ímóti Lyngby var úrslitið 4–4. Líkindini vóru vánalig. Tað varð spælt á sandvølli, og tað vóru bæði kavi og ísur á vøllinum.

## Óli undanvind

Á heimasíðuni hjá Hvidovre tykjast teir vera væl nøgdir. Serliga væl nøgdir eru teir við verjupartin. Liðformaðurin á føroyska landsliðnum, Óli Johannesen, er fastur maður í miðverjuni. Tá Hvidovre tapti 5–3 á útivølli ímóti AB, varð ein av høvuðsorsøkunum søgd at vera, at Óli Johannesen ikki var í miðverjuni. Hann hevði drigist við ein lítlan skaða, og undir upphitingini noyddist hann at staðfesta, at tað ikki bar til at spæla.

Í 4–4 dystinum ímóti superligu liðnum Lyngby skoraði Óli Johannesen tvey mál.

Fyrsta umfarið í landskappingini í næstbestu donsku deildini verður vikuskiftið 16. og 17. mars. Umfarið verður tað 16. í hesum kappingarárinum. Hvidovre skal spæla á útivølli sunnudagin 17. mars. Mótstøðuliðið verður gamla stórfelagið í Odense, sum eitur B1909.

Venjingardystir eru á skránni tvey tey næstu vikuskiftini. Nú leygardagin skal Hvidovre spæla ímóti Knabstrup og annan leygardag skulu teir spæla ímóti Skjold.

# Í Býin


MENU - eftirverðar
Ísur - 3 kúlur 25,-
Ískakao 25,-
Ísur í Soda 25,-
Belgisk vafla 28,-
v/ ísi ella róma
Køka 28,-
v/ súrróma ella róma
Pannukøkur 28,-
v/ ísi ella róma





Opið er soleiðis:
Mánadag - hósdag 12.00-24.00
Fríggjadag - leygardag 12.00-01.00
Sunnudag 14.00-24.00
livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

fk Matseðilin
Hósdagin 28. feb.: Grýturættur
Fríggjadagin 1. mars: Kalkunsnitsel
Leygardagin 2. mars: Enskan búff
Mánadagin 4. mars: Kjøtbollar í karrysós
Týsdagin 5. mars: Lambafrikassé
Mikudagin 6. mars: Lasagna
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgari *ella* Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík





fríggjakvøldið 01/03 Ladies Night DJ Ottar
Konufólk ókeypis atgongd til kl. 01.00
leygarkvøldið 02/03 DJ Ottar
20 ára aldursmark
PLATFORM
discoteque
petur & petur • 320870

Kaggin
Í vikuskiftinum spæla
Fluffy Toys





www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

Í Býin
- hvønn hósdag




# Í Býin


NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið :
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu





Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 286254

HOTEL ØRAVÍK ***
Matstovan bjóðar
Hvørt fríggja- og leygarkvøld:
-Rækjubland
-Enskan el. franskan búff
Bert......155,-
Hvønn sunnudag millum kl. 12.00 og 15.00
-Suppu
-Steik
-Dessert
Bert......128,-
Borðbílegging á
Tlf.: 37 13 02
Fax: 37 20 57

Long drinks Café
LIVANDI TÓNLEIKUR HÓSKVØLDIÐ 14.02.02
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
www.marcopolo.fo
Opið er:
Mán.–Hós. kl. $17^{00}$ – $23^{30}$
Fríggjadag kl. $17^{00}$ – $03^{30}$
Leygardag kl. $17^{00}$ – $03^{30}$
Sunnudag kl. $17^{00}$ – $23^{30}$

Klubbadansur
Leygarkvøldið 2/3 spæla
TAXI
Havnar Klubbi: staðið, har fólk møtir áðrenn tað er tíð at fara heim
HK Havnar Klubbi
Sosialurin - 311820

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 1. mars
• "Fimmari"
• Sjavskapping verður kl. 19.00
UNDIRHALD
Leygardagin 2. mars
• Opið frá kl. 22.00
• Dansur frá kl. 24.00-04.00
SLICK spælir

Hafnia Lounge
· Stórt úrval av kaffi
· Dagsins køka
· Sandwich
· Flógv terta við salati
· Ymisk "snacks"
· Smyrjibreyð frá kl. 14-17
(aftaná kl. 17 eftir áheitan)
Upplatingartíðir
*Sunnudag - hósdag*
Opið kl. 14.00-24.00
*Fríggjadag & leygardag*
Opið kl. 14.00-01.00
Hotel Hafnia
Tlf. 31 32 33 · Fax 31 52 50

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Flúrar
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Leygarkvøldið verður bingo kl. 20.00
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

ÚT AT ETA -
Lat okkum um Uppvaskið:
MENU VIÐ 3 RÆTTUM
Einans 195,00 kr.
RIO · BRAVO
Tlf 319767
RESTAURANT





Rækjubland
Angus-búffur við pipar- ella Bernaise-sós
Ís-dessert
195,00 kr
Borðbílegging á tlf. 319767
Casablanca Ristorante





Casablanca suppa
Grillaður Lambsryggur Arabbiata
Ísur Tricolora
195,00 kr
Borðbílegging á tlf. 319696

Manhattan
PUB & CAFÉ
Restorffs





V dagur
Fríggjadagin 1. mars
1700 - 1900

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK





AUTO
311234